# Daniel skal venja VÍF-kvinnur

Tað verður Daniel Rápa, sum í vetur skal taka sær av besta kvinnuliðnum hjá VÍF. Eftir fráveru í eitt ár skulu vestmannakvinnur nú aftur spæla í Sunset-kappingini, og nú er venjaraspurningurin loystur. VÍF boðar á heimasíðuni frá, at Daniel Rápa er settur sum venjari hjá kvinnunum. Daniel hevur eisini áður virkað sum venjari hjá VÍF. Í fjør var hann ein av berandi spælarunum hjá KÍF, og tað er sannlíkt, at hann eisini komandi árið fer at spæla við teimum.

# Meistararnir styrkja hópin

Manchester United hevur boðað frá, at teir hava gjørt avtalu við portugisisku Porto og Sporting Lissabon um at keypa ávikivast Anderson og Nani. Teir báðir spælararnir verða mettir sum komandi stjørnur í europiska fótbóltsheiminum, og tí var tað ein errin stjóri í felagnum, David Gill, sum kundi kunngera, at teir eru keyptir. Undan hesum hevur Manchester United vissað sær undirskriftina hjá Owen Heargraves, og samlaða upphæddin fyri teir tríggjar spælararnir sigst liggja um 450 mió kr.

# Jákup og Jákup fara um teir 50

**Ímóti Italia verður Jákup á Borg sjeyndi føroyingurin, sum røkkur hálvt hundrað landsdystum, og møguleiki er fyri, at Jákup Mikkelsen ímóti Skotlandi røkkur sama dystartalinum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Tá ið føroyska landsliðið leygarkvøldið fer í eldin ímóti italsku heimsmeistarunum, verður tað 50. ferðin, at Jákup á Borg fer at umboða føðilandið. Tá ið Føroyar mikukvøldið í næstu viku fara at spæla á heimavølli ímóti Skotlandi, verður tað 50. ferðin, at Jákup Mikkelsen fer at verja málið fyri Føroyar.

Jákup á Borg verður tann sjeyndi, og Jákup Mikkelsen verður tann áttandi føroyingurin, sum fer at røkka 50 landsdystum. Teir, sum higartil hava rokkið so nógvum dystum, eru Óli Johannesen (80), Jens Martin Knudsen (66), Julian S. Johnsson (63), John Petersen (57), Allan Mørkøre (54) og Øssur Hansen (51).

Jákup á Borg spældi fyrstu ferð á landsliðnum í 1998. Tann 19. august hetta árið, sendi Allan Simonsen Jákup, sum tá umboðaði barndómsfelagið B36, á vøllin í Sarajevo, tá ið tað restaðu tólv minuttir. Jákup loysti Una Arge av. Bosnia vann 1-0.

Føroyar hava, síðani Jákup var við fyri fyrstu ferð, spælt 58 landsdystir. Tað vil við øðrum orðum siga, at Jákup á Borg síðani tá hevur verið við mest sum hvørja ferð. Undantakið var, tá hann gav avboð til eina venjingarlegu av arbeiðsávum, og tá skaðar ella leikbann hava forðað honum at spæla.

Jákup á Borg er føddur 26. oktober í 1979 og harvið 27 ára gamal, og hann hevur umboðað B36, OB og HB á landsliðnum.



*Jákup á Borg hevur síðani 1998 spælt 49 av 58 dystum. Fyrstu árini sum innskiftari, men síðani 2-0 sigurin á útivølli móti Luksemburg hevur hann við einum undantaki verið millum teir fyrstu ellivu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### 20. árið

Føroyska landsliðið er komið væl inn í sítt 20. ár í altjóða fótbólti. 24. august 1988 spældu Føroyar fyri fyrstu ferð, eftir at altjóða limaskapurin var vorðin veruleiki. Søguliga uppgerðin var ímóti grannunum fyri vestan. Ísland vann vinardystin í Akranesi 1-0.

Higartil eru 111 landsdystir spældir. Tann síðsti var í Tbilisi í Georgia, har Føroyar leygardagin 28. mars taptu 3-1. Rógvi Jacobsen skoraði føroyska málið, tá ið hann í 57. minutti minkaði um munin til 2-1.

### Jákup alla tíðina

Um alt gongur, sum tað verður vónað og roknað við, at tað skal gera, so fer Jákup Mikkelsen at verja føroyska málið bæði leygarkvøldið ímóti Italia og mikukvøldið ímóti Skotlandi.

Jákup Mikkesen var við í Akranesi 24. august 1988. Tá sat 18 ára gamli KÍ unglingin alla tíðina á beinkinum. Jens Martin Knudsen var málverji. Nøgvu tær næstu ferðirnar vóru ikki landsliðsboð eftir Jákupi, tí Kaj Leo Johannesen varð úttikin saman við Jens Martini.

Síðani 1992 hevur Jákup verið fast inventar á landsliðnum. Eingin hevur víst sovorðið tol at bíða eftir møguleikanum, sum Jákup Mikkelsen hevur gjørt tað. 2. juli í 1995 spældu Føroyar og Ísland á Neskaupstaðum á Eysturlandinum. Tað var fyrsta ferðin, at Jákup vardi føroyska málið. Íslendingar vunnu vinardystin 2-0.

Jákup Mikkelsen er føddur 14. august 1970 og sostatt 36 ára gamalur. Hann man vera ein av spælarunum, sum hevur umboðaði flest feløg á landsliðnum. Umframt barndómsfelagið KÍ og B36, sum hann nú spælir við, hevur Jákup verið landsliðsspælari fyri Herfølge í Danmark, Molde í Noregi og Partick Thistle í Skotlandi.

Næstu spælararnir, sum hava møguleika at røkka hálvt hundrað landsdystum, eru Fróði Benjaminsen og Rógvi Jacobsen. Teir hava báðir spælt 42 landsdystir. Fróði Benjaminsen er leikbannaður leygarkvøldið, tá ið Rógvi Jacobsen fer at spæla fyri Føroyar fyri 43. ferð.

# McLaren snýtti ikki



*Lewis Hamilton hevði enn eitt fínt vikuskiftið á breytini í Monako, uttan fyri breytina var hansara orðaval munandi óhepnari*

*mynd: Polofo/AP*

**Motorítróttarfelagið FIA hevur kannað atburðin hjá McLaren Mercedes í formil 1 koyringini í Monaco sunnudagin og hevur avgjørt, at McLaren einki galið hevur gjørt**

FORMIL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Eftir sigurin hjá McLaren Mercedes bilunum á breytini í Monaco sunnudagin, segði annar av koyrarunum, Lewis Hamilton, at hann hevði fingið boð um ikki at trýsta ella fara framum liðfelagan, Alonso. Sambært reglunum hjá FIA, er tað ikki loyvt at brúka sonevnd ólóglig liðboð, har ein av koyranum fær boð um ikki at fara framum hin. Motorítróttarfelagið FIA kannaði tí atburðin hjá felagnum.

Í Monaco er nærum ómøguligt at fara framvið bilum, og yvirhálingarnar kundu teljast á einari hond hendan dagin. Tí hevði ein nærdystur millum teir báðar í McLaren væl kunna endað við, at báðir bilarnir fóru í sor.

### Vanlig mannagongd

FIA hevur kannað radiosamskiftið millum McLaren pittin og bilarnar, og har var ikki mett at nakað galið var farið fram. Í grundgevingini skrivar FIA m.a.:

- Tað ein vanlig mannagongd hjá einum liði, at biðja koyrarar sínar, um at koyra spakuligari, tá tey eru nóg langt frammanfyri avbjóðandi lið, hetta fyri at minka um vandan fyri tøkniligum ella øðrum trupulleikum. Tað er somuleiðis vanlig mannagongd og sum heild skilagott, at biðja koyrarnar hjá liðnum um ikki at vera til vanda fyri hvør annan.

Stjórin í Formil 1 Bernie Ecclestone segði annars í gjár við Reuters, at McLaren liðið kundi fáa eina metstóra bót ella enntá verða koyrt úr kappingini, um liðið hevði brotið reglurnar sunnudagin

### Schumacher reglugerð

Reglugerðin um liðboð varð broytt, tá Ferrari fyri nøkrum árum síðan góvu Rubens Barrichello boð um at lata Michael Schumacher koma framvið honum og fáa sigurin. Henda hending østi nógv fólk, og hóast reglugerðin ikki var heilt greið tá, so fekk Ferrari eina millión dollarar í bót. Størstu bótina higartil, fingu turkisku formil 1 fyriskiparanir í fjør. Hon var áljóðandi 5 milliónir dollarar.